

*Samstundis sum hotellið hevur broytt innihald, er møguleiki hjá fólki at síggja eina málningaframsýning hjá listamálaranum Hilmari Højgaard. – Her eru í løtuni fimm málningar, men skjótt verða teir fleiri, sigur Jaspur Langgard, stjóri*

# Gamalt hotel við nýggjari ætlan

**Eftir at hava verið afturlatið eina tíð, lat Hotel Runavík uppaftur 1. juni. – Vit hava longu merkt, at tørvur er á einum slíkum hotelli her í økinum, sigur nýggi stjórin, Jaspur Langgard. Hann er bjartskygdur um raksturin á hotellinum**

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Runavík:** - Tað serstaka við tí virkseminum í hotellinum er, at tað er óneyðugt at skula svara uppá allar spurningarnar, ið snúgva seg um vit hava skeinkiloyvi ella ikki.

- Vit borðreiða nevniliga bert við morgunmati til gestirnar. Skulu teir eta ein betri bita um kvøldið, vísa vit til onnur støð í økinum, sigur nýggi hotelstjórin.

Fyrr kundi tú bæði eta og sova á tí, sum tá kallaðist Runavíkar Sjómansheim. Seinni fekk tað navnabroyting til Hotel Runavík, og nú er aftur ein broyting hend á staðnum:

Hotellið hevur broytt konsept, og dúvar nú meiri uppá gistingar, ráðstevnur, fundir og tílíkt, men altso ikki uppá eina fjølbroytta matskrá allan dagin.

- Vit hava eisini ymiskar ætlanir um skeiðvirksemi, sigur Jaspur Langgaard.

## Gott úrslit

Hóast minni enn ein mánaður er farin, síðani Hotel Runavík lat upp aftur, kann ein nøgdur stjóri staðfesta, at tað hevur gingið sera væl.

- Vit hava havt sera nógvar gistingar henda fyrsta mánaðin, - serstakliga fólk frá vinnulívinum, meðan talið av ferðafólki higartil hevur ligið um tey 10 prosentini.

*»Her er ikki longur møguleiki at keypa sær ein døgurðabita ella støkka inn á gólvið at keypa sær ein nátturðabita ella kaffimunn eins og áður«*

- So vit hava verið sera væl nøgd við henda fyrsta mánaðin, sigur Jaspur Langgaard, og sum eisini er sera bjartskygdur fyri restina av summarinum og árinum í síni heild.

Hann setti sær eina rakstrarætlan upp fyri hetta árið, og er ikki eina løtu í iva um, at hann fer at røkka hesum málinum við ársenda.

Hóast hetta árið ikki er hálvrunnið enn, og hotellið hevur staðið tómt í eina tíð, hevur hann longu fingið fleiri bíleggingar til næsta ár.

- Talan er um ein stóran og rættiliga góðan ordra frá januar mánaði og heilt fram til mars. Ja, hesin ordrin er so mikið góður, at hann kann gera sítt til, at vit eisini fáa eitt sera gott úrslit komandi ár, sigur Jaspur við einum brosi.

## Rótt avgerð

"Sjómansheimið í Runavík" sum tað áður kallaðist, og seinni Hotel Runavík, hava undanfarin ár havt tvey tilboð til tey ferðandi: Gisting og matstovu.

Nú, ið Jaspur Langgaard hevur tikið við leiðsluni, hevur hann valt eina øðrvísi loysn við bert gistingum og einum góðum morgunmati.

*»Hóast hetta árið ikki er hálvrunnið enn, og hotellið hevur staðið tómt í eina tíð, hevur hann longu fingið fleiri bíleggingar til næsta ár«*

Hetta merkir aftur, at her er ikki longur møguleiki at keypa sær ein døgurðabita ella støkka inn á gólvið at keypa sær ein nátturðabita ella kaffimunn eins og áður.

- Eg kann so bara higartil staðfesta, at hetta hevur verið ein røtt avgerð, sigur hann.

## Samstarv við fyritøkur

Ein stórur partur av arbeiðinum hjá hotelstjóranum í Runavík er marknaðarføring, eins og tað týdningarmikla arbeiði at fáa fatur á røttu persónunum á røttu fyritøkunum.

Í hesum arbeiðinum hevur Jaspur verið í sambandi við fyritøkur og virkir í økinum, og sum hava nógv brúk fyri gistingum, tá útlendskar vitjanir eru á skránni, ella tá skip skulu skifta manning.

Fleiri fyritøkur hava eisini brúkt møguleikarnar á hotellinum til skeið- og fundarvirksemi. Tá verður skipað soleiðis fyri, at luttakararnir eta morgunmat, sum er gjørdur á hotellinum.

Restin av matinum til luttakararnar verður keyptur aðrastaðni frá, ella fólk fara sjálvi út til matstøð í økinum at eta ein betri bita um kvøldið.

- Líkt er til, at fólki dámar væl umstøður okkara. Eg havi longu fingið fleiri bíleggingar um skeið í heyst, sigur hann.

Í dag hevur hotellið eina stóra matstovu, men ætlanin er at skipa hana øðrvísi, soleiðis at møguleikarnir til skeiðvirksemi og bólkaarbeiði verða enn betri.

- Hetta skal bara gerast betri og betri, sigur Jaspur Langgaard.